# Elektron bjóðar fullkomna KT-loysn

**Á KT-stevnuni, sum verður í Norðurlandahúsinum í komandi viku, fer Elektron at leggja fram eina nýggja KT-loysn, ið kann lætta um hjá nógvum fyritøkum**

KT-VINNA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

KT-loysnin, ið sipað verður til, er tann sonevnda Citrix-loysnin. Skipanin er rættuliga umfatandi og kann verða ein fullkomin KT-loysn fyri eina fyritøku. Við eini CITRIX-loysn kann ein fyritøka fullkomilig sleppa undan at hava sínar egnu ambætarar og enntá lokalar harddiskar.



*Niels Christian Nolsøe, stjóri í Elektron, er sera spentur uppá, hvørja móttøku nýggja CITRIX-loysnin fer at fáa á KT-2006*

*savnsmynd*

### Alt á goymslu hjá Elektron

CITRIX-loysnin virkar á tann hátt, at ein fyritøka kann hava øll síni data, forrit og annað á goymslu á einum stórum ambætara hjá Elektron.

Á henda hátt sleppur fyritøkan eisini undan sjálv at taka sær av viðlíkhaldi, ikki er neyðugt at hava KT-fólk í starvi í fyritøkuni, og eisini slepst undan at hava stór KT-tól, sum brúka nógv pláss, standandi í hølunum hjá fyritøkuni. Hetta ger sjálvsagt, at tað verður nógv rúmsáttari í hølunum.

Niels Christian Nolsøe, stjóri í Elektron, sigur, at CITRIX-loysnin er ein sera trygg loysn, og sjálvt um øll data verða goymd á einum ambætara hjá Elektron, so er tað bert fyritøkan sjálv, ið hevur atgongd til hesi data.

– Øll data verða krypteraði, soleiðis at eingin annar kann fáa fatur á teimum. Ein annar fyrimunur er eisini, at brúkarin kann sleppa inn á ambætaran, óansæð hvar hann er staddur. Um hann til dømis er á ráðstevnu uttanlands, so kemur hann beint inn á ambætaran hjá Elektron og fær fatur á sínum data. Tað er ógvuliga einfalt og brúkaravinarligt, sigur Niels Christian Nolsøe.

Á KT-stevnuni í Norðurlandahúsinum í komandi viku fer Elektron millum annað at vísa áhugaðum heilt nágreiniliga, hvussu CITRIX-loysnin virkar, og hvørjar fyrimunir hon hevur.



*Tað hevur gingið stak væl við royndarboringunum til Skálafjarðartunnilin.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Gera boriroyndir til fasta sambandið

Hesa seinastu tíðina hava menn arbeitt við at gera boriroyndir í Sandvíkum, har ætlanin er, at ein møguligur undirsjóartunnil millum Skálafjørðin og Havnina skal knýtast í Streymoynna.

Royndarboringar skulu gerast niður á umleið 130 metrar, og higartil hava menn borið gott og væl niður á helvtina av hesi dýpd. Sum skilst hava royndarboringarnar gingið stak væl.

**tn**

---

# Nýtt El-innleggjaravirki

**El|net er navnið á nýggju fyritøkuni, sum Bernhard Petersen, Ólafur Debes og Poul Erik Johannesen hava sett á stovn**

NÝTT VIRKI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Teir tríggir hava í fleiri ár fingist við el-arbeiði av ymsum slag, men við at seta á stovn nýtt felag, ætla teir sær at taka kappingina upp við hinar á marknaðinum.

### Breiðar royndir

Bernhard og Ólafur, sum báðir eru havnarmenn, lærdu á Tórshavnar Skipasmiðju miðskeiðis í 90'unum, men síðani hava teir verið ymsa staðni og arbeitt. Eftir at hava verið í Oslo í hálvtannað ár, hevur Bernhard síðani tikið útbúgving sum maskinmeistari og el-innleggjari, og seinnu árini hevur hann starvast sum maskinmaður hjá Sveipi á Argjum. Ólafur fór eftir lærutíðini til skips sum maskinmaður, umframt at hann eitt skifti var í Skagen fyri El-Service. Seinastu fimm árini hevur hann verið í starvi hjá El-heilsøluni, Solar, sum kundaráðgevi.

Poul Erik, sum er úr Vestmanna, hevur seinastu seks árini starvast hjá Tummas Eli Hansen, har hann eitt nú hevur verið partur av byggingini hjá Føroya Tele í Hoyvík og umbygginini av Landssjúkrahúsinum. Undan hesum var hann í fleiri ár í Australia, har hann hevði egið el-virki.

Teir tríggir siga, at teir í eina tíð hava tosað um at stovna egið virki. Eftirspurningurin eftir elektrikarum hevur verið sera stórur seinastu árini. Bæði tí nógv er til av arbeiði, men eisini tíð nógvir føroyskir elektrikarar hava leitað sær uttanlands í arbeiðsørindum.

### Bjartskygdir

Hóast el|net bert hevur góðar tríggjar vikur á baki, so tykjast teir tó ikki ivast í, at hetta fer at bera væl til hjá teimum.




*Teir tríggir nýggju virkiseigararnir. Ólafur Debes, Bernhard Petersen og Poul Erik Johannesen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

– Í løtuni er í øllum førum nóg mikið av arbeiði hjá elektrikarum, so vit fara neyvan at ganga tómhentir. Hartil haldi eg eisini, at við royndunum, sum vit hava, so spenna vit rættiliga vítt innan el-yrkið. Nakað sum vit eisini hava roynt at fingið við í navngevingini av virkinum. Hartil meta vit, at nú vit allir í felag eiga virkið, so tryggjar tað virkinum eitt betri støðufesti - og tí eisini tryggleika til kundar okkara, sigur Ólafur.